## SKEMMAN

### SØKIR HANDILSLÆRLING

**Gerst handilslærlingur hjá okkum og fá nógvar fyrimunir!**

**Vit bjóða:**
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
- Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark.
Gjøgnum samstarvið við Jysk, fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jyllandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanligan handilsútbúgving.
Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

**Nær skalt tú byrja?**
Lærlingurin skal byrja 2. mai.

**Hevur hetta tín áhuga:**
Send so eina skrivliga umsókn innan 31. mars til:

**SKEMMAN**

STARAVEGUR 7 · POSTBOKS 3278 · 110 TÓRSHAVN · TEL 31 55 88
TELDUPOST: skemman@skemman.fo

Sosialurin 341800

*Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Íslandi, Canada, Letland, Litavia og Estland. Í hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 17 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 550 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 6 londunum.*

---

**Norðoya Røktarheim**
**700 Klaksvík**

Søkt verður eftir

# Summarfrítíðar-avloysarum

til heimið frá 01. juni til 31. august 2005. Vit søkja avloysarar fyri sjúkrarøktarfrøðingar, sjúkrahjálparar, heilsurøktarar og heilsuhjálparar.

Heimið hevur 2 deildir við 18 búplássum á hvørjari deild. Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

Lønar- og setunartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og autorisation verður at senda til leiðaran fyri Norðoya Røktarheim, FO-700 Klaksvík.

Umsóknarfreist 08.apríl 2005.

---

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
**800 Tvøroyri**

Søkt verður eftir

# Frítíðaravloysarum

í tíðarskeiðnum 1. juni til 30. september 2005 fyri:

- sjúkrarøktafrøðingar
- sjúkrahjálparar/heilsuatstøðingar

Løn og setanartreytir sambært sáttmála við ávíkavist Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar/Almanna- & Heilsurøktarfelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna Sunnevu Petersen tlf. 37 16 66 lok. 147.

Umsóknir við avritið av prógvum v.m skulu sendast til:

**Suðuroyar Ellis- & Røktarheim**
**Postsmoga 51**
**800 Tvøroyri**

Umsóknarfreist: 1. apríl 2005.

---

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
**FO-700 Klaksvík**

## Deild M - Medisinsk seingjardeild

Vegna barnsburðarfarloyvi søkja vit eftir

# Sjúkrarøktarfrøðingi

at arbeiða 0,9 tíð frá 15.05.05 til 31.12.05.

Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinska sjúkrarøkt
- góð samstarvsevnir
- Ynskiligt er við roynd um innan øki.

Lønar-og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 455463, Synnøva Hansen deildarleiðari, lokal 403, ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu, lokal 106.

Umsókn við avriti av prógvi og autorisation verða at senda til Klaksvíkar Sjúkrahús, att: Umsjón-armaðurin, FO-700 Klaksvík.

Umsóknarfreist 31. mars 2004 kl. 12.

---

**Søkt verður eftir**

# Leiðara

**til barnagarðin "Leikan" í Skálavík**

Fyri leiðara í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir avloysara at arbeiða 30 tímar um vikuna í tíðarskeiðinum 15. apríl til 31. oktober 2005.

Í barnagarðinum, sum er 4 $^{1}/_{2}$ ára gamal og normeraður til 15 børn, eru bæði vøggustovu- og barnagarðsbørn og eisini skúlabørn í frítíðar-ansingini.

Áhugaðir umsøkjarar, ið hava fyrispurningar, eru vælkomnir at seta seg í samband við kommununa, tlf. 361031 ella 21 92 21.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum verður at senda til Skálavíkar kommunu, 220 Skálavík, og skal verða okkum í hendi seinast hósdagin 07. apríl 2005 kl. 12.00.

Lønar og setanartreytir sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

**Skálavíkar Kommuna**

---

**Suðuroyar Sjúkrahús**
**FO 800 Tvøroyri**

# Frítíðaravloysarar fyri portørar

Søkt verður eftir frítíðaravloysarum fyri sjúkrahúsarbeiðarar (portørar) frá 15. juni til 31. august 2005.

Umframt koyring av sjúkrabili umfatar starvið alt fyrifallandi inni og úti arbeiði.
Tilkalluvakt heimanífrá.

Tað er ein fyrimunur at umsøkjarar havar fyrstuhjálparskeið.

Løn sambart sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðsmannafelag.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og upplýsingum um starvsroyndir skal sendast til:

**Umsjónarmannin**
**Suðuroyar Sjúkrahús**
**Postsmoga 51**
**800 Tvøroyri**

Umsóknarfreist: 1. apríl 2005.

---

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!